## Fyrsti kappróðurin

Er tað nakað sum kappróðrarfólkið hevur sæð fram til, man tað vera fyrsti FM-róðurin í ár. Kl. 15 leygardagin verður lagt til brots við øllum teimum mongu og spentu róðrarmanningunum, sum nú sleppa at vísa hvørjari venjing tær eru í. Sum skilst er talið av tilmeldaðum bátum til róðrarnar í summar sera høgt, og lítið man vera at ivast í, at bátarnir fara at leggja nógv fyri at vinna sær týðandi stig í kappingini at gerast FM-vinnarar í summar. Eftir at kappróðurin er liðugur fer Jógvan Skorðheim, varaborgarstjóri at handa steyp til vinnandi bátarnar. Hetta verður gjørt í Klaksvíksgarðinum.

## Betesda endar stevnuna uttandura



Nógv ymisk tiltøk eru at fara til á hesi fyrstu stevnuni í summar. Samkomurnar í Klaksvík fara aftur í ár at spenna seg út við tiltøkum, bæði úti og inni. Í KFUM&K verða fleiri tiltøk stevnudagarnar, og tað verða tað eisini í Betesda, sum m.a. fer at gera vart við seg sunnukvøldið. Fyrst fer Betesdakórið at syngja í Vágstúni um morgunin, og út á kvøldið verður sangmøti inni í salinum. Og tá tey eru liðug við hetta fara fólk úr samkomuni at hava útifund í Vágstúni. Sambært eini skrá til Norðoyastevnuna verður hetta samstundis seinasta tiltakið.

# Ein fríður býur fyri rímiligan kostnað

**Komandi árini fer Klaksvíkar kommuna miðvíst at fríðka ymisk øki í býnum. Eitt av hesum støðum er gongugøtan frá Bakkahjallinum til róðrarneystið, har nógv fólk gongur dagliga**



*"Reinur og fríður er Klaksvíkar býur". Soleiðis æt tað fyrr, og soleiðis skal tað eisini verða í framtíðini*

*Mynd: klaksvik.fo*

**Klaksvík:** - Vit fegnast um, at tað er eydnast at fremja eina so sjónliga og nyttuga íløgu fyri so avmarkaðan kostnað, staðfestir Óli M. Lassen, formaður í Teknisku Nevnd.

Kostnaðurin av fríðkanararbeiðinum er mettur til einar 200.000 krónur.

Tekniska Nevnd hevur viðgjørt fíggjarligu støðuna á tekniska økinum og hevur staðfest, at sera lítið av peningi er tøkur til kommunal arbeiðir. Tí verða bert nøkur fá smærri arbeiðir framd nú, eins og onnur arbeiðir, har kommunan hevur gjørt einhvørja binding.

- Kommunan hevur seinastu mongu árini uppkeypt neystini á Biskupsstøð við niðurtøku fyri eyga, og tí var tað gjørligt nú at gera hendan partin fyri ein so avmarkaðan kostnað, sigur Óli M. Lassen við heimasíðuna hjá Klaksvíkar kommunu.

Hann vísir á, at fleiri av neystunum vóru í so ringum standi, at tíðin var búgvin til at taka hesi niður. Nú neystini eru burtur, hevur kommunan fingið fleiri parkeringspláss eystanfyri róðrarneystið.

Tá ið hetta arbeiðið við Bakkahjallarnar er liðugt, verður farið undir at fríðka krókin millum Klaksvíksvegin og omankoyringina til lítlukai, sum nevndin eisini hevur raðfest í ár.

*Snorri Brend*

## Dýrur mánaður fyri kommununa

Tølini fyri inntøkurnar hjá Klaksvíkar kommunu í mai mánaði vísa greitt tað, sum mong annars bóru ótta fyri:

Næstan tvær milliónir krónur minni eru komnar inn í kommunukassan henda farna mánaðin, enn somu tíð í fjør.

Nýggjastu tølunum frá Toll og Skatt vísa nevniliga, at mai royndist sera illa, meðan mars mánaður helt nøkunlunda stand, tá skattainntøkurnar minkaðu við bert 0,08 prosentum.

Høvuðsorsøkin til hesa gongdina er kreppan í fiskivinnuni. Hetta hevur serliga rakt fiskivinnuhøvuðsstað okkara, har afturlatingin av Kósavirkinum og sølan av fleiri skipum úr býnum, eru høvuðsorsøkir til hetta.

Afturgongdin í skattainntøkuni í mai var omanfyri 14 prosent og sum er met, tí nærmasta fallið var í februar mánaði í ár tá skattainntøkan fall 6,56 prosent.

Úr kommununi verður sagt, at tey fingu 9,5 mió krónur inn í kommunu skatti í mai mánaði í ár, ímóti 11,2 mió kr. í mai 2008.

## Skerja fíggjarætlanina við 11 mió

Týskvøldið í farnu viku samtykti býráðið í Klaksvík ta endurskoðaðu fíggjarætlanina fyri 2009. Arbeitt hevur leingi verið hesum, tí greitt varð at neyðugt varð við skerjingum av útreiðslunum hjá kommununi.

Gunvá við Keldu, borgarstjóri, upplýsir, at tann endurskoðaða fíggjarætlanin hjá kommununi samanlagt er skerd við umleið 11,4 mill. krónum, sum bæði fevnir um skerjing av útreiðslum og øking av inntøkum kommununnar. Góðar 3 mió krónur eru funnar innan íløgur, meðan 4,3 mió eru spardar innan rakstrarútreiðslurnar.

Triðja høvuðsøkið, har skarvað er av útreiðslusíðuni, eru avdráttir av lánum kommununnar. Eftir samskifti við lánveitarar og Fíggjarmálaráðið er ætlanin í ár at skerja avdráttirnar av lánunum úr 10 mill. krónum niður í 6 mill. krónur.

- Hetta er ein skerjing á 4 mió krónur, so samanlagt geva hesi tiltøkini umleið 11,4 mió í sparingum, upplýsir borgarstjórin.

Sosialurin